## David Nielsen fekk treytaðan dóm



Danski fótbóltsspælarin, David Nielsen hevur fingið dóm fyri at sláa fyrrverandi liðfelagan, Allan Gaarde niður. David Nielsen varð dømdur 20 daga treytaða fongsulsrevsing. Tað merkir, at David Nielsen sleppur undan at sita dómin í fyrsta umfari. Verjin hjá David Nielsen, Axel Pallesen royndi at fáa David Nielsen fríkendan. Grundgevingin hjá Axel Pallesen var, at tað sum David Nielsen hevði skrivað í bókini "Sorte svin", var ikki heilt í samsvari við veruleikan. Talan var heldur um eitt slagsmál, enn eina valdsgerð. Tann frágreiðingin bleiv tó pettað sundur, tá Thomas Augustinussen og Allan Olesen vitnaðu í málinum. Teir staðfestu, at frágreiðingin hjá Allan Gaarde var tann rætta. Og tað legði Dómarin í býarrættinum í Ålborg herðslu á, tá dómurin var avsagdur.

## Heðin skal hjálpa HB

Tað er nú greitt, at tað verður Heðin Joensen, sum saman við Sámal Erik Hentze skal standa á odda fyri Formulaliðnum hjá HB í ár. Sámal Erik, sum annars hevur virkað sum hjálparvenjari hjá EB/Streymi, kom til HB í fjør, tá broytingar vórðu gjørdar í venjaratoyminum, og í ár verður tað við honum sum høvuðsvenjara, at HB skal royna seg. Tað hevur fram til nú verið ógreitt, hvør hjálparvenjarin skuldi verða, men við setanini av Heðini Joensen er greitt, at tað verða tveir fyrrverandi spælarar hjá felagnum, sum skulu royna at fáa liðið upp aftur á ovastu rók í føroyskum fótbólti.

Dráttur-Fleyr 1-3 (21-25, 21-25, 25-14, 15-25):

# Fleyr er í finaluni

**Kvinnurnar hjá Fleyr skulu fyri fyrstu ferð royna seg í stóru steypafinaluni í flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Síðani steypakappingin í flogbólti varð skipað av nýggjum í 2008, hevur Fleyr ongan tíð átt umboð í kvinnufinaluni. Men tað hevur havnarfelagið hesaferð*

Eiðisfólk fingu høvið at síggja toppin av føroyskum flogbólti, tá eyka hálvfinala í gjárkvøldið varð spæld millum kvinnuliðini hjá Drátti og Fleyr.

Neyðugt gjørdist við eyka dysti, tí liðini høvdu hvør í sínum lagi vunnið ávikavist Fleyr-og Mjølnirkappingina, og tá SÍ umvegis landskappingina hevði hevði vissað sær hin finalusessin.

Og tað eydnaðist altso Fleyr at vinna hendan dystin 3-1. Við hesum eru kvinnurnar hjá Fleyr til reiðar at spæla sína fyrstu steypafinalu, síðani kappingin fyri átta árum síðani varð umskipað til verandi leistin.

Finalan verður spæld í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn tann 14. februar.

## Liverpool leingir við Benitez

**Partarnir eru samdir um tíðarmálið og lønina**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Líkt er til, at Liverpool fer at leingja sáttmálan við tann spanska venjaran, Rafael Benitez. Partarnir hava fingið lønina og tíðarmálið fyri næsta sáttmálaskeiðið uppá pláss.

Væl umtókti venjarin hjá Liverpool hevur 18 mánaðir eftir av sínum núverandi sáttmála. Men longu í november fóru partarnir í gongd við samráðingarnar um ein nýggjan sáttmála. Benitez ynskti, at sáttmálin skal verða undirskrivaður í januar, og alt talar fyri, at tað fer at eydnast.

\- Umboðsmaðurin hjá mær hevur móttikið eitt útkast til sáttmálan vit sótu við ígjár. Vit eru samdir um tíðarmálið og lønina. Nú skulu vit tjakast um mín leiklut og mítt ábyrgdarøkið, sum høvuðsvenjari hjá felagnum. Sigur Benitez við blaðið, Liverpool Echo.

Sambært enskum fjølmiðlum, so hevur Benitez kravt fullan ræðisrætt, tá tað snýr seg um keyp og sølu av spælarum. Men hesum vísir Benitez aftur. Liverpool er oddaliðið í Premier League við 45 stigum.

# Harley setir gaggurnar

**Eftir 21 ár í fremstu røð hevur Harley Bertholdsen nú gjørt av, at hann ikki longur er partur av besta KÍ-liðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verur uttan royndasta spælaran, at KÍ nú ger seg til reiðar at spæla Formulafótbólt.

Harley Bertholdsen hevur fleiri ferðir áður umhugsað, um hann skuldi halda á fram við fótbólti í fremstu røð, men nú er endaliga avgerðin tikin.

Við Norðlýsið sigur KÍ-veteranurin, at hann sjálvandi fer at sakna tað at fara til venjing hvønn dag, og hann útilokar ikki heilt, at hann kann vera tøkur, um tað onkursvegna skuldi verið tørvur á tí til onkran dyst. Og í øllum førum ætlar hann sær ikki at gevast fullkomuliga við fótbóltinum, sum helst heldur fram á nakað meira hugnaligum og minni álvarsligum støði.

Hinvegin hevur KÍ-hópurin eisini merkt nakað av tilgongd. Millum teirra, sum hava verið á vøllinum fyrstu venjingarnar í ár, er nevnliga eisini 33 ára gamli Arnold Joensen, skrivar Norðlýsið.



*Harley Bertholdsen hevur síðani 1988 verið fastur partur av besta mansliðnum hjá KÍ. 21 ár í fremstu røð er tó nóg mikið, sigur veteranurin, sum nú fer at taka sær meira av løttum, hvat fótbólti viðvíkur*

*Mynd: Norðlýsið*